Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hans Jacob Thomsen, løgtingsmaður

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Skattur av lágum inntøkum

Spurningar:

1. Hvussu nógv í landskatti rindaði ein mánaðarlig inntøka á ávikavist 17.500 kr., 22.500 kr., 27.500 kr., 32.000 kr., 37.500 kr., 50.000 kr. og 85.000 kr. í 2015?
2. Hvussu nógv í landskatti rindar ein mánaðarlig inntøka á ávikavist 17.500 kr., 22.500 kr., 27.500 kr., 32.000 kr., 37.500 kr., 50.000 kr. og 85.000 kr. í 2025?
3. Hvussu stóra skattalækking/-hækking hava inntøkurnar omanfyri fingið í 2025 í mun til 2015?

Viðmerkingar:
Síðani 2012 eru broytingar gjørdar í landsskattinum tríggjar ferðir, sum hava lætt um inntøkuskattin hjá fólki. Í 2012 kom sonevndi flatskatturin hjá borgarligu flokkunum, og tvær reisur hevur samgongan millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn givið lág- og miðalløntum eina skattaminking. Fyrru ferð í 2016, og so aftur nú árini 2024 og 2025.

Í sambandi við skattalættarnar til lág- og miðalløns hava andstøðupolitikkarar havt á lofti, at lágløns hava ikki fingið lut í skattalættunum. Fyri at fáa greiðu á hesum máli, verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 16. januar 2025

Hans Jacob Thomsen